# Er hetta nýggja Dimmalætting?

SÓLBJØRN THOMSEN



Øll, sum eru góð við fótbóltin og ikki minst landsliðið, fegnast sjálvandi um, at ungi B36-leikarin, Ingi Højsted, er við at koma fyri seg aftur, eftir at hann hevur verið burtur frá fótbóltinum í eitt ár, orsakað av einum serstakliga óhepnum skaða, hann fekk fyri einum ári síðani.

Settist tí týskvøldið við vanliga spenninginum at lesa greinina, Áki L. Hansen hevði skrivað í Dimmalætting um Inga Højsted og hansara hørðu lagnu, eftir at hann fekk skaða í einum dysti móti HB í fjørvár.

Visti, at Ingi fyri tíð síðani byrjaði at venja aftur, so tí tók eg sum givið, at her fór at koma ein jalig grein um ein ungan og evnaríkan leikara, ið reistist aftur eftir drúgvan skaðasteðg.

Gjørdist av tí sama ikki sørt skakkur, tá mær longu fremst í greinini gjørdist greitt, at hetta als ikki var tann sólskinssøga, eg hevði væntað, men at her var ríkiligt av malurt blandað uppí.

Var blaðmaðurin ein svorin B36 viðhaldsmaður av tí slagnum, ið trívist best við svørtum bindi fyri eyguni, hevði eg kanska skilt tað, men mær vitandi er talan ikki um ein slíkan. Tí undrist eg uppaftur meira.

Tá eg so mikudagin í Radius hoyrdi blaðstjóran á Dimmalætting, Árna Gregersen, greiða frá, at leitað hevði verið í arkivinum hjá blaðnum, skilti eg beinanveg, at høvuðsinnihaldið í hesum arkivi er B36 heimasíðan.

Tvey brot í greinini eru so skelkandi, at eg næstan ikki finni orð fyri tí. Tey avdúka í øllum førum, at blaðmaðurin ikki hevur brúkt sítt egna blað sum keldu til fortíðina, og heldur ikki nakað annað blað.

Í staðin brúkar hann generellar vendingar, ið verða turkaðar upp á í fyrsta lagi B36 viðhaldsfólk og í øðrum lagi fótbóltáhugað. Men í báðum førum er hetta bert skálkaskjól fyri at sverta Kára Nielsen!

Tað fyrra er hetta: »Við vilja ella ikki? Tað kom øði í grindina á vøllinum í Gundadali, og uttan fyri sótu heit B36 viðhaldsfólk, ið hildu, at Kári Nielsen hjá HB einans hevði eitt upp á hjartað: At skaða Inga Højsted.«

Og tað seinna brotið er hetta: »Taklingin verður ofta skírd av fleiri fótbóltsáhugaðum at vera tann harðligasta taklingin nakrantíð í føroyskum fótbóltshøpi.«

Sjálvt um eg veit, at blaðmaðurin ikki er gamal í garði og tí helst sum flestu onnur stríðist við byrjunartrupulleikar, tá tey eru farin í holt við eitt krevjandi yrki, haldi eg ikki, at alt hetta skal fara óátalað aftur við borðinum.

Mín fyrsti spurningur er, um Dimmalætting ikki hevur vaksið fólk, ið leggur tí yngra lag á. Tað kann vera við rættlestri, rættleiðing og ikki minst grundleggjandi tingum, sum at tú hvørki skalt gita ella illgita, men skriva sannleikan.

Her er ketan lopin av hjá Dimmalætting, tí tey bæði brotini omanfyri eru gitingar og í ringasta føri illgitingar. Sannleiksvirði er null, og øðrvísi kann tað ikki verða, tá tú brúkar eina fanatiska heimasíðu sum høvuðskeldu í einum eymum máli.

Eg fór so at leita í bæði tí, Dimmalætting og Sosialurin skrivaðu um dystin, og í hvørgum føri síggi eg nakað um, at fólk fara at minnast dystin fyri harðligastu takling nakrantíð í føroyskum fótbóltshøpi.

Hinvegin kundi skrivingin í bløðunum bent á, at fólk fara at minnast dystin fyri heit B36 viðhaldsfólk, tí eftir dystin staðfesti Dimmalætting undir yvirskriftini »B36 sá reytt«, at »B36 kann vænta sær karantenur fyri tað, sum hendi undir og aftan á dystin«.

Og Sosialurin skrivaði undir yvirskriftini »Fløskur sendandi á vøllin«, at bæði tómar – og ein einstøk full sodavatnsfløska! – varð tveitt langa leið av B36-tribununi og inn á vøllin.

Hendiliga óhappið tíðliga í dystinum, tá Ingi Højsted fekk eina harða síðutakling frá Kára Nielsen, ger hvørki blaðið nakað serligt burturúr, sjálvt um tað er eitt alment loyndarmál, at blaðmenninir í báðum førum eru ikki ókunnumenn í B36.

At B36 heimasíðan er høvuðskeldan hjá Áka L. Hansen til fyrrnevnda brotið úr grein hansara, er einki at ivast í. Vanliga er tað góður skikkur at nevna sínar keldur, men hóast hann ikki hevur gjørt tað, so eri eg vísur í, at heimasíðan er keldan.

Har finni eg einastu umrøðu eftir nevnda dyst, ið málber seg sum blaðmaðurin: »HB hevði eina greiða, men ódámliga ætlan frá byrjan. B36-miðvøllurin – og serliga Ingi Højsted – skuldi hava av at vita. Kári Nielsen var maðurin, sum skuldi gera skitna arbeiði, og tað royndi hann so eftir førimuni.«

Tá so Árni Gregersen sum ein loyalur blaðstjóri í Radius royndi at verja sín óhepna blaðmann og vísti til arkivið, nevndi hann nakað um, at Ingi Højsted varð sparkaður niður tríggjar ferðir í dystinum, áðrenn hann fór skaddur út.

Har er eisini B36 heimasíðan keldan: »Tríggjar ferðir lá Ingi eftir alt ov harðligar og fyrilitaleysar taklingar, áðrenn hann longu í 12. minutti varð liggjandi og mátti skiftast út.«

Nú havi eg sjálvur hugt aftur eftir upptøkunum frá dystinum, og somuleiðis hevur Árni Gregersen havt møguleika til tað. Og har fæst sjón fyri søgn, at sannleiksvirðið er so sum so í tí, Áki L. Hansen skrivar í Dimmalætting týskvøldið. Og sama má sigast um okkurt av tí, Árni Gregersen royndi at verja seg við í Radius.

At Kári Nielsen er ein harður og kontantur leikari, ið gevur seg fult út hvønn einasta dyst, er almenn vitan. Hansara partur liggur ongantíð eftir, men harfrá og so til at skíra hann harðskapsmann, er eitt øgiliga langt og ósømiligt lop!

Í síni umrøðu av dystinum í fjør nevndu bæði Dimmalætting og Sosialurin fleiri leikarar, ið áttu at blivið revsaðar við korti. Rætt skal vera rætt, at Kári Nielsen verður nevndur, men áðrenn hann nevna bløðini ávikavist Mikkjal Thomassen og Kenneth Jacobsen, og í Sosialinum verður Símin Hansen eisini nevndur.

Í báðum førum er talan um royndar ítróttarskrivarar, so eg taki sum givið, at teir duga sítt handverk og kenna fótbóltin. Hvørgin teirra tykist hava sæð Kára Nielsen framt »harðligastu takling nakrantíð í føroyskum fótbóltshøpi«.

Hví í víðu verð hetta nú skal dragast fram av nýggjum og blásast upp sum fótbóltsyvirgangur av ringastu skuffu, havi eg ilt við at skilja, tí her er eitt heilt ár farið, uttan at hetta yvirhøvur hevur verið eitt evni.

Eg dugi ikki at síggja nakað endamál í, at Kári Nielsen skal spillast út og dragast upp í hetta mál, tá veruleikin er, at Ingi Højsted eina og aleina var ófatiliga óheppin, at hann fekk so stóran skaða av eini kropstakling, vit síggja fleiri av hvønn einasta sunnudag.

At Dimmalætting kemur við slíkum einvísum persónsálopi, ið snildisliga verður fjalt millum reglurnar, sigur mær bara, at greinin »Meislaður fyri lívið« leggur nýtt botnstøði í blaðskrivingini.

Eg má tíverri staðfesta, at hóast landsins elsta blað hevur fingið nýggjan blaðstjóra, er støðið heldur lækkað enn hækkað, so vónandi fer tað at muna, tá nýggjur tíðindastjóri kemur at leggja lag á í næstum.

Fyrsta uppgávan hjá nýggja tíðindastjóranum verður at lúka B36 heimasíðuna burtur úr arkivinum hjá Dimmalætting, og harnæst at greiða blaðfólkunum frá, at kritiskur journalistikkur sjáldan kemur langt, um tú bert hyggur við øðrum eyganum!

# Oslo's onde arv

LEIF JACOBSEN

Eiði

Oslo-fredsprocessens endeløse, ufrugtbare forhandlinger har skabt en mudret situation: palæstinenserne er fanget et eller andet sted mellem opbygning af en stat og befrielseskamp, uden at være eller have det ene eller det andet. Som et resultat bærer de frihedens ansvar uden i virkeligheden at nyde frihed. Verden ser på dem, som om de var i en postkolonial fase, mens kolonialisterne stadig er i nærheden.

Oslo-processen har yderligere omformet det palæstinensiske revolutionære projekt til en korrupt handelsklasse, som nyder visse fordele fra besætterne. Hamas' sejr ved valgene har overrumplet denne handelsklasse. Siden da har Fatah-bevægelsen afvist at erkende sit nederlag, til at begynde med afvist at indgå i en enhedsregering med Hamas, og ventede spændt på at bevise, at Hamas har mislykket uden først at give den en chance.

EU, USA og Israel har boykottet regeringen og givet deres bidrag til dens forventede fiasko og til det palæstinensiske blodbad. Hamas havde i mere end to år før deres valgsejr afholdt sig fra selvmordsangreb og har bestemt sig for at deltage i processen skabt i Oslo. Ariel Sharon, som afviste Oslo, fik sin chance ved magten og var ikke boykottet af verden; Hamas fik ikke den samme chance.

Nu rapporterer det israelske dagblad, Ha'aretz, at Israel agter at frigive de palæstinensiske skattepenge, som det har tilbageholdt, siden Hamas kom til magten, fordi den palæstinensiske præsident, Mahmoud Abbas, har besluttet at fyre regeringen. Dette ser ud som en anden umiddelbar belønning og opmuntring til et parti frem for det andet, for at ophidse til borgerkrig. Medierne har rapporteret ved flere lejligheder i de sidste to år om penge, træning og våben fra USA og Israel til Fatah. Alt med det formål at vælte en lovlig valgt regering.

Abbas's personlighed og manglende lederskab er en af årsagerne til den aktuelle krise. Han er en svag leder, som mangler evner til at håndtere sådanne komplekse situationer, han mangler karisma, han opfører sig som en partileder snarere end en præsident, og han mangler den symbolske kapital, som Arafat nød. Han er yderligere anset som en, der er villig til at give indrømmelser, langt udover hvad den palæstinensiske offentlighed er villig til at overveje. Men Israel er ikke villig til at acceptere andet end fuldstændig og betingelsesløs kapitulation.

Kampene i Gaza er skammelige. Til trods for alt det ovenstående bærer Fatah og Hamas hovedansvaret for blodbadet. Oslo, ser det ud til, var en fejltagelse. Virkeligheden med palæstinensere, som dræber hinanden for et meningsløst selvstyre (mens besætteren ler) er tragisk. De palæstinensiske partier burde vide bedre. De bør fokusere på en fælles strategi, som vil drive kolonisatorerne ud. Denne primære opgave har været glemt i den trivielle politiks ebbe og flod. Det palæstinensiske selvstyre bør opfattes som intet andet end et middel til at nå målet. Hvis det ikke hjælper palæstinenserne til at opnå selvbestemmelse, så bør det opløses helt.

Undertrykte folk har haft lignende erfaringer. Mod slutningen af 1980'erne blev 100 sorte sydafrikanere dræbt i sorte-mod-sorte vold, og mellem 1990-1993 blev gennemsnitlig 259 sorte dræbt hver måned. Det var de sidste dage af apartheid. Man må håbe, at det interne palæstinensiske blodbad vil slutte snart og med det, friheden begynde.

Øravík Hov tunnilin:

# Skal norðari portalurin nú leingjast í 12. tíma?

JOHAN DAHL

Løgtingsmaður



Ístak, sum hevur gjørt eitt valaarbeiði í samband við Øravíks-Hov tunnlin, er so smátt fari at rigga av við hesum arbeiði og ætlaðu mær kunnugt, at tunnilin skal verða klárur at taka í nýtslu tann 15. juli 2007.

Nú verður tosað um millum manna, at byggieftirlitið krevur norðrara portalin longdan við 15-20 metrum.

Hetta má sigast at verða langt úti - serliga havandi í huga, at Ístak longu í fjør summar mælti til at portalurin bleiv longdur 15-20 metrar.

Eg havi fylgjandi spurningar til byggieftirlitið:

- Hví hevur byggieftirlitið ikki fyri langt síðani gjørt vart við leingjan av portalinum á norðraru síðu á Øravíks-Hov tunnlinum??
- Hví bleiv hetta arbeiði ikki avtalað at verða gjørt, tá Istak vísti á tað í fjør?
- Hvussu nógv seinkar hetta upplatingini av tunlinum í mun til ætlaðu upplatingina, sum Ístak hevði sett sær fyri at verða 15. juli 2007 - altso ca. ½ ár áðrenn ásettu liðugtgerð av tunnlinum?
- Hvør skal gjalda fyri, at hetta nú skal gerast, sum skilst so hevur Ístak gjørt sín avtalaða part.
- Gjaldir Landsverk ella Landsbyggifelagið, sum hava eftirlit við arbeiðinum???

Vágur 17.06.2007